# Fiskimálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 12-11-2020 |
| Mál nr.: | 20/00445-1 |
| Málsviðgjørt: | |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir havtasku og svartkalva við gørnum í føroyskum sjógvi**
(Hjáveiða av krabba og lógartillagingar)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 39 frá 15. apríl 2019 um at skipa fiskiskapin eftir havtasku og svartkalva við gørnum í føroyskum sjógvi verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Inngangurin verður orðaður soleiðis:
"Við heimild í § 22, stk. 1, § 34, stk. 1, nr. 1, 3 og 4, stk. 2, nr. 2 og 10, § 38, stk. 3 og § 64, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, verður ásett:"

**2.** § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Fiskiloyvi, sambært stk. 1, verða latin persóni ella felag, sum í 2018, við fiskifari undir føroyskum flaggi, hevði rætt til fiskiloyvi til fiskiskap eftir havtasku og svartkalva við gørnum í føroyskum sjógvi, ella fiskifari, sum hesin rættur seinni er fluttur á."

**3.** § 2, stk. 4 verður strikað.

**4.** Í § 7 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Hjá fiskifari við loyvi sambært hesi kunngerð kann hjáveiða av krabba í mesta lagi vera 3% av vektini av veiðinøgdini tilsamans fyri túrin."

**5.** Í § 19, stk. 3 verður "Sambært § 87" broytt til: "Sambært § 70".

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert